## DAGSINS MEINING

# Rentustuðulin - ein hjálp ella vansi

Búskaparfrøðingurin Jonhard Eliassen mælir til at halda fast við gomlu avgerðina um at rentustuðulin skal lækka í stigum. Hann heldur tí, at Javnaðarflokkurin, sum hevur skotið upp at varðveita rentustuðulin á verandi stigi, tekur uppskot sítt aftur, so rentustuðulin lækkar sum ætlað, tá rentustuðulin varð hækkaður í kreppuárunum.

Grundgevingin hjá Jonhardi Eliaseen er m. a., at soleingi vit hava ein rentustuðul, ber tað í sær, at sethús eru bæði ov dýr at keypa og at byggja. Tann einasti, sum hevur fyrimun av hesum er tann, sum annaðhvørt eigur nøkur hús ella grundstykki at selja. Eingin annar hevur nakran fyrimun av hesum, heldur búskaparfrøðingurin, sum vanur er at hava greiðar meiningar um búskaparviðurskifti. Hann gloymir, at sjálvandi hava timburhandlar o.l. ein fyrimun, eins og tey, sum hava stór sethúslán, eisini hava ein fyrimun.

Hetta er eitt áhugavert evni, sum er umrøtt á hesum plássi áður. Her er enntá nevndur tann møguleiki, at rentustuðulin varð heilt tikin av við ein brest fyri alla sølu og alla nýbygging, samstundis sum ein skiftisskipan varð gjørd fyri tey, sum búgva í sethúsum og hava lán, sum ganga eini 10, 15 ella 20 ár fram í tíðina. Tey hava lagt eina fíggjarætlan fleiri ár fram. Í hana er rentustuðulin bygdur inn, og tað ber ikki til at taka hann av, tí so hevði tað ført til fíggjarligt ragnarrok fyri hesi.

Grundgevingin fyri at taka hetta evnið upp á hesum stað var at fáa eitt orðaskifti um henda spurning, tí pástandurin var - og er framvegis - at rentustuðulin heldur keypsprís og byggiprís uppi á einum ónegðuga høgum støði. Um tað er so ella ikki, kunnu vit øll og sjálvandi búskaparfrøðingar hava eina meining um, men líkt er til, at tað er torført at fáa eitt orðaskifti um hetta mál. Men spurningurin er framvegis, um prísirnir at keypa og byggja hús ikki lækkaðu líka nógv sum rentustuðulin í dag er?

Orsøkin hjá Javnaðarflokkin at leggja uppskotið um at varðveita rentustuðulin fram var hon, at kostnaðarstøðið er hækkað so nógv í seinastuni, at lækkar rentustuðulin, fáa fólk ikki endarnar at røkka saman. Men so løgið tað ljóðar, so koma búskaparfrøðingar nærum ongatíð inn á tann spurningin: -Hevur vanligi føroyingurin ráð at búgva í Føroyum.

Vit hava upplivað ta seinastu tíðina, at oljan og bensinið er hækkað nógv. Harafturat er rentan hækkað nakað. Og samstundis eru flest allar aðrar vørur hækkaðar í prísi. Fer so rentustuðulin eisini at lækka, so treingir hetta so nógv um hjá tí vanligu føroysku familjuni at lívbjarga sær, at hon klárar tað valla.

Samanumtikið merkir tað, at skal rentustuðulin ikki lækka, má okkurt annað gerast fyri at fólk kunnu klára seg! Men slíkar spurningar viðgera búskaparfrøðingar tíverri sjáldan.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



### Lago farin

Hósdagin andaðist Jákup Joensen, vanliga nevndur Lago í Kvívík 81 ára gamal. Lago var ein tíðandi maður í Kvívík og hann var eisini væl kendur uttanfyri heimbygdina.

Lago var mesta partin av lívinum røktingarmaður í stóra Ognarhaganum í Kvívík, sum telir heilar 12 merkur. Sum 16 ára gamal fór hann at røkta saman við pápanum og tá pápin legðist fyri røktaði hann einsamallur. Hetta verður av kvívíkingum mett at vera eitt bragd, tí áðrenn vóru fýra røktingarmenn í haganum.

Lago var óførur at kenna seyð og í Ognarhaganum var ikki so lítið at minnast til. Hagin er stórur 12 merkur og hvør mørkin ber upp til 32 áseyðir. Tá væl var lambað, so vóru nógv ferføtt at minnast lit og onnur eyðkenni á og Lago kendi hvønn einasta seyð í haganum.

Lago var skemtingarsamur og dugdi væl í práti. Ein eldri kvívikingur fortelir okkum, at tá teir sigldu sum yngri við Fonsdal og Egil, so savnaðist fólkið altíð um Lago á frívaktini. Hann var skemtingarsamur og dugdi at sita undir og hann var ein lívligur maður.

Lago hevur eisini veirið útróðrarmaður í mong ár, hann var góður miðjamaður og væl lá fyri at fáa fisk. Tað er ikki óvanligt, at góðir røktingarmenn eisini eru góðir miðjamenn. Til bæði yrkini krevst skil og hegni.

Politiskt var Lago grammur sambandsmaður sum alt slagið undan Kollinum. Hans Iversen, løgtingsmaður í mannsaldrar, var morbróður Lago´s.

Lago var giftur Marionnu úr Kvívík. Tey eiga fýra børn, tríggjar dreingir og eina dóttir.

---

†

Kæri sonur og bróðir okkara

**Ingi**

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin
20. januar, 48 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið
23. januar kl. 19 heim í Ebenezer.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elsa og Ingálvur av Reyni**

---

†

Kunngjørt verður fyri slekt og vinum, at kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Tummas Thomassen**
**í Havn**
føddur í Sandavági 5. august 1909

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin
20. januar.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
týsdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin kl. 12.00.

*Familjunar vegna*
**Kristoffur, Jóna og Janus**
**Elsa Johanna, Tummas Petur og Poul Christoffur**

---

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona mín, mamma, omma og vermamma okkara

**Oddvør í Bø**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkara, sum talaðu og á annan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina. Starvsfólkunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har hon fleiri ferðir var í sambandi við sjúkuna, eru vit sera takksom fyri dygdarverk og frálíkt handalag. Sama skotsmál og somu tøkk skulu heimasjúkrasystrarnar fáa. Og ikki minst Jaspur Petersen, lækni, fyri hansara aldri svíkjandi áhuga og ótroyttiligu royndir í fleiri ár at lekja og linna.

Vit takka teimum mongu, sum í sambandi við jarðarferðina lótu peningagávur til Krabbameinsfelagið og øllum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Og ikki at gloyma øll tey, sum undir longu sjúkraleguni sendu heilsanir, vitjaðu og á annan hátt høvdu samskifti við Oddvør. Tað fløvaði. Tøkk øll somul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Líggjas**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Marknagilsvegurin latin upp

**Nú er arbeiðið at breiðka Marknagilsvegin liðugt og koyrandi var eftir nýggja vegnum leygardagin. Boði Haraldson, býarverkfrøðingur, væntar, at nýggi vegurin fer at avlasta ferðsluna í miðbýnum munandi**

MARKNAGILS-VEGURIN
*Stefan í Skorini*

Býráðið skipaði ikki fyri nøkrum hátíðarhaldi leygardagin, tá koyrandi var eftir Marknagilsvegnum fyri fyrstu ferð í fleiri mánaðir. Orsøkin er, at vegurin ikki er rættiliga liðugur enn.

Býarverkfrøðingurin, Boði Haraldson, sigur seg vænta, at breiðkaði vegurin fer at avlasta ferðsluna á Jóannesar Patursonargøtu munandi. Við ljóskurvarnar har er vanliga nógv ferðsla um morgunin og seinnapartin.

– Vit eru spentir um, hvussu ferðslumynstrið fer at vera nú. Vit hava ferðsluteljingar ymsastaðni í býnum, og tær fara at vísa, hvussu Marknagilsvegurin verður brúktur. Væntandi fer ferðslan at glíða betur nú, sigur Boði Haraldson.

Enn er vegurin ikki asfalteraður, tí asfalt fæst ikki úr Hundsarabotni hesa tíðina á árinum, og onkrir snøklar eru eisini eftir at gera. Boði Haraldson sigur, at Marknagilsvegurin stendur ovast á uppgávulistanum, tá asfalt aftur fæst úr Hundsarabotni.

Boði Haraldson sigur, at enn kann hann ikki meta um kostnaðin, tí arbeiðið ikki er liðugt enn.



*Marknagilsvegurin fer at avlasta ferðsluna í miðbýnum munandi, væntar býarverkfrøðingurin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Norröna avlýsir vegna storm

**Norrøna skuldi fara av Havnini mánamorgunin, men hesin túrurin varð avlýstur vegna ógvuliga ringa veðurforsøgn. Leiðslan og skiparin væntaðu ikki, at Norrøna hevði klárað heimaftur til ásettu tíðina, og tá hon skal avstað aftur longu hóskvøld, hevði tað verið torført at klárað henda túrin**

ILLVEÐUR
*Stefan í Skorini*

Veðurforsagnirnar í Norðsjónum siga frá sera nógvum vindi næstu dagarnar. Tí verður ætlaði túrurin hjá Norrønu av Havnini til Hanstholm og heimaftur avlýstur.

Veðurfrøðingarnir ávara um vindmegi 9 á farleiðini hjá Norrønu. Vindmegi 9 er 21-24 metrar um sekundi. Tað hevði tí verið ógvuliga torført hjá Norrønu at hildið ferðaætlanina, sum løgd er frammanundan.

Skiparin og leiðsan komu tí ásamt um ikki at sigla henda túrin, tí vánirnar fyri at koma heimaftur til ásettu tíðina ikki vóru góðar.

### Klára ikki hóskvøldið

Heðin Joensen á farmadeildini hjá Smyril Line sigur, at vindurin hevði verið beint á kjaftin bæði niður til Hanstholm og uppaftur til Føroyar. Skipið fór tí at vera ógvuliga nógv seinkað.

Ætlanin var, at Norrøna skuldi fara av Havnini mánamorgunin og úr Hanstholm mikudagin. Farast skuldi so avaftur Havnini hóskvøldið, men vegna nógva vindin hevði Norrøna ikki klárað aftur á Havnina, so hon kundi leggja frá landi til ta ásettu tíðina hóskvøld.

Sum landið liggur nú, nýta viðskiftafólkini hjá Smyril Line nógv meira leiðina, ið siglir hóskvøld. Tí verður hon vald framum leiðina mánamorgun. Á hesum túrinum mánamorgun er sjáldan útselt umborð, meðan hóskvøld er skipið sum oftast heilt fult báðar vegir.

Smyril Line metir tað tískil vera týdningarmiklari at halda ferðaætlanina henda túrin enn at sigla túrin mánamorgun.



*Norrøna mátti avlýsa túrin av Havnini mánadagin, tí stormur var á leiðini til Hanstholm. Norrøna hevði tí verið ov nógv seinkað*


VETRARTILBOÐ við Norrönu



**Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin**

| | 4-koyggju kamar v. wc/bað | 2-koyggju kamar v. wc/bað | Luksus kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 3.640,- | 4.620,- | 6.940,- |
| Bilur + 3 fólk | 2.920,- | 3.660,- | |
| Bilur + 2 fólk | 2.210,- | 2.700,- | 3.860,- |

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðaríbúðir/Summarhús:
Danland í 1 viku
úr 4.995,-
2 vaksin & 2 børn í bili
Dansk Folkeferie í 1 viku
úr 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior í 1 viku - Keypmannahavn
úr 3.795,-
fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum
Park Hotel í 1 viku - Ålborg
úr 3.350,-

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com